# Bestu bogaskjúttarnir kosnir

**Bogaskjótifelagið Tambar skipaði mikukvøldið fyri seinastu innandura kappingini í vetur og vóru tað teir yngru skjúttarnir, sum skutu um føroyameistaraheitið á 15 metra frástøðu**



*Jastrid M. Jensen, sum her sæst nummar tvey frá vinstru, varð kosin sum ársins skjútti í recurve*

BOGASKJÓTING
*tíðindaskriv*

Kappingin bleiv skotin í venjingarhølinum hjá Tambar. Við í kappingin vóru 18 luttakarir - 6 í compound og 12 í recurve.

Kappingin varð skipað við innleiðandi umfari á 60 pílar við eftirfylgjandi finaluumførum, har byrjað varð við 1/4-finalunum. T.v.s. at í bólkinum recurve skuldu bert 8 tey bestu víðari.

### Recurve

Í bólkinum recurve vóru tað tær royndastu genturnar, sum gjørdu um seg og var sera spennandi um tvey tey fremstu plássini. Jastrid M. Jensen, Tambar, hevði munin og førdi við trimum stigum í steðginum, tað sama gjørdi hon heilt fram til teir seinastu tríggjar pílarnar, tá hon kom at gera okkurt lítið mistak.

Endaliga støðan í innleiðandi umfarinum var: nr. 1 Annika Vang, Ørvur, við (281+283) 564 stigum, nr. 2 Jastrid M. Jensen, Tambar, við 284+277) 561 stigum og persónligum meti, nr. 3 Rói Christiansen, Tambar, við (251+263) 514 stigum.

1/2-finalurnar: Annika Vang-Hallur Mortensen, Tambar, 112-97, Jastrid M. Jensen-Johan Egholm, Tambar, 115-92. Jastrid skeyt við hesum 115 stigum fyri 12 pílar á 15 metrum nýtt føroyskt met fyri gentur, gamla metið var 114 stig. Rói Christiansen-Eirikur á Kletti, Tambar, 104-94 og Sjúrður Rein, Tambar-Rógvi Larsen, Tambar, 102-99.

1/2-finalurnar: Annika-Sjúrður 113-99 og Jastrid-Rói 111-105.

Dysturin um bronsuna var sostatt millum Róa og Sjúrð og var javnur og spennandi. Rói vann dystin við 107-105.

Dysturin um føroyameistarheitið var millum báðar bestu genturnar Anniku og Jastrid. Eisini her var javnt líka til endan, dysturin endaði 111-107 og Annika Vang, Ørvur, endurvann føroyameistaraheitið á 15 metrum.

Í hesum bólkinum høvdu fleiri skjúttar persónlig met.

### Compound

Í bólkinum compound var tað ein skjútti, sum legði seg eitt vet fram um hinar, Kristoffer Andreasen, Ørvur, førdi við fimm stigum í steðginum, men so tók hann dik á seg og skeyt eitt ótrúliga gott úrslit við bert at missa tíggju stig teir næstu 30 pílarnar.

Endaliga støðan í innleiðandi umfarinum var: nr. 1 Kristoffer Andreasen, Ørvur, við (283+290) 573 stig og persónligum meti, nr. 2 Kaj Johannesen, Ørvur, við (278+275) 553 stigum og nr. 3 Súnfríður Jacobsen, Ørvur, við (275+274) 549 stigum.

1/4-finalurnar: Her sótu Kristoffer og Kaj yvir fyrsta dystin ímeðan hesir dystir vóru: Súnfríður Jacobsen, Ørvur-Magnus Andreasen, Ørvur, 108-76 og Helgi Lamhauge, Ørvur-Jógvan Elias O. Davidsen, Ørvur, 106-105.

1/2-finalurnar: Kristoffer-Helgi 110-101 og Súnfríður-Kaj 112-111. Hesin seinni dysturin var sera javnur og spennandi.

Dysturin um bronsuna var millum Kaj og Helga og gjørdi Kaj bart og vann dystin 113-106.

Dysturin um føroyameistaraheitið var millum Kristoffer og Súnfríða. Dysturin byrjaði javnt og helt tað sær til hálvan dystin, tá Kristoffer legði seg eitt stig fram um og við seinastu trimum pílunum vann hann enn eitt stig. Dysturin endaði 114-112 og Kristoffer Andreasen, Ørvur, bleiv nýggjur føroyameistari á 15 metra frástøðu.

Í bólkinum blivu skotin fýra persónlig met.

### Ársins skjúttar

Sum vanligt er velur Bogaskjótideildin á hvørjum ári ársins skjútta. Hetta avrik verður mett eftir, hvussu skjúttin sum heild hevur klárað seg seinasta árið, tað verði seg við framgongd, menning og ídni til venjingar og kappingar.

Í recurve bleiv Jastrid M. Jensen, Tambar, vald til ársins skjútta.

Í compound bleiv Kristoffer Andreasen, Ørvur, valdur til ársins skjútta.

Tey hava bæði gjørt stór framstig, hava møtt sera væl upp til venjingar og kappingar, tey eisini hava luttikið í kappingum fyri vaksin. Eisini hava tey víst góðan kappingaranda, bæði tá tað hevur gingið við og ímóti.

Statoilstøðin í Saltangará lat heiðursmerkir og steyp til kappingarnar.

# FSF tekur støðu um sponsor

Fótbóltssamband Føroya skuldi á fundi fríggjadagin taka støðu til, hvørt landskappingin í 1. deild nú skal fáa egnan sponsor.

Óli Holom, formaður í FSF, kunnaði á fundi seinasta fríggjadag feløgini um málið, og síðani hava feløgini so havt møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Freistin fyri hesum var úti týsdagin, og fríggjadagin skuldi FSF so taka støðu til, hvørt teir taka av møguleikanum, sum nú hevur stungið seg upp.

Sum vit hava skilt, so hava fleiri av feløgunum ikki verið serliga væl nøgd um, at málið er komið so brádliga upp. Fundur var seinasta fríggjadagin, og longu týsdagin var freistin hjá feløgunum at svara runnin.

Hartil tykist tað eisini so, at fleiri av feløgunum eru misnøgd um býtislykilin, sum FSF hevur skotið upp um inntøkurnar.

Tað verður ikki sagt nakað um, hvør fyritøkan er, sum vil gerast sponsor hjá Fótbóltssambandinum, men keldur innnan fótbóltsheimin vilja vera við, at talan er um formula.fo.

Verður tikið av avtaluni, er ætlanin, at øll feløg í bestu deildini í ár skulu hava búmerkið hjá sponsorinum á búnanum. Hartil er ætlanin eisni, at lýsingar skulu vera kring fótbóltsvallirnar, har dystir verða spældir og í leikskráirnar hjá ymsu.

-jm

*Soleiðis sær nýggja búmerið hjá B36 út*

# Nýtt B36-búmerki

Bóltlfelagið B36 í Havn hevur nú gjørt av, at gamla búmerkið skal skiftast út við eina nýggjari útgávu.

Nakra kollvelting verður talan tó ikki um. Nýggja búmerki er í stóran mun bygt á útsjóndina á tí gamla, men altjóða frámerkið, sum B36 nýtir til UEFA-Cup dystir – B36 FC Tórshavn – framgongur nú á búmerkinum. Og vit hava hugt at, hvørjir sniðgevarnir hava verið, so er hetta kanska heldur ikki so løgið.

Tað er Hannis Egholm, sum hevur teknað nýggja búmerkið, og tað var pápi hansara, Hans Jacob Egholm, sum á sinni stóð fyri gamla búmerkinum.

-jm

# Gulldagur í Vestmanna

**Í dag verða seinastu dystirnir í Atlantic Airways kappingini hjá monnum leiktur, og vestmenningar fáa FM-steypið og gullheiðursmerkir handað á heimavølli.**

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í Vestmanna hava tey leingi bíðað eftir degnum í dag, har mansliðið hjá VÍF fær handað FM-steypið sum prógv uppá, at vestmenningar eiga besta hondbóltsliðið í Føroyum 2005. Tað eru longu tvær vikur síðani, at VÍF tryggjaði sær meistaraheitið, og síðani tá hava vestmenningar bara bíðað eftir, at teir skuldu fáa gullmerkini.

Endurtøka av steypafinaluni

Seinasti dysturin hjá føroyameistarunum á árinum verður ímóti StÍF, og sostatt verður talan um eina endurtøku av steypafinaluni í ár, har vestmenningar vóru noyddir at lúta fyri strandingar.

Tað man verða lítið at ivast í, at VÍF ætlar sær at enda kappingarárið við maner, og dysturin í dag móti strandingum fer neyvan at gerast nøkur endurtøka av dystinum sunnudagin í Havn, har vestmenningar vóru eyðmýktir av Kyndli.

Tað ger heldur ikki uppgávuna hjá VÍF léttari, at StÍF framvegis hevur nakað at spæla fyri. Strandingar hava enn møguleikan at vinna silvurið, men tað krevur, at StÍF vinnur í Vestmanna, og samstundis skal Kyndil snáva móti Neistanum á Hálsi.

### Neistan vann seinastu grannauppgerðina

Seinast tey bæði havnarliðini, Neistin og Kyndil, dystaðust, var tað botnliðið Neistin, ið endaði omaná. Hetta var ein dyggur smeitur hjá Kyndli, sum í veruleikanum tá misti møguleikan fyri at endurvinna meistaraheitið.

Tí man lítið verða at ivast í, at teir grønu sera fegnir vilja hava uppreisn móti grannunum í dag, men hinvegin hevur Neistin verið sera væl koyrandi seinastu umførini. Men skulu kyndilsmenn verða vísir í silvurinum, so skulu teir vinna á grannunum.

Seinasti dysturin á seinasta leikdegnum í Atlantic Airways kappingini verður í Hoyvík, har KÍF og H71 hittast. Hesi bæði lið hava sum so ikki tað stóra at spæla fyri, men hoyvíkingar fingu ein ordans lússing frá Neistanum sunnudagin, og tað vilja teir óivað vaska av sær á seinasta leikdegnum.